# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Føroya Tele:

## Eilif Debes farin frá



Fríggjadagin 3. juni 2005 hevði Eilif Debes á Oyri sín seinasta arbeiðsdag hjá Føroya Tele í Saltangará eftir 33 ár í starvi hjá stovninum. Skipað var fyri móttøku á stovninum frá kl. 14.

Eilif er ættaður av Oyri. Hann var sjómaður og sigldi sum dekkari og kokkur, til hann í 1972 fekk starv hjá Føroya Tele. Hesi árini hevur hann arbeitt sum kaðalmaður, montørur og við feilfinning. Hann arbeiddi út frá støðini í Kollafirði til 2004, tá hann varð fluttur til støðina í Saltangará.

Eilif fer nokk ikki at sita hendur í favn, nú hann fer frá sum telefonmaður, hann hevur fleiri frítíðaráhugamál sum t.d. ættargransking, at dreyga úr træ, og so hevur hann eisini stóran áhuga fyri føroyskum blómum.

Foreldrini hjá Eilif vóru: Trina Debes, sum var ættað úr Beitinum, og Sámal Debes, vanliga nevndur Sámal í Smiðjuni, bæði av Oyri.

Eilif er giftur Hildu, f. Thomasen, ættað úr Kvívík. Tey eiga fýra børn: Karin, sum býr í Danmark, Sámal og Heðin, sum búgva á Oyri, og Rúni, sum býr í Tjørnuvík.

## Eyvindur Mohr deyður



Hóskvøldið 2. juni andaðist Eyvindur Mohr, listamaður, á Landssjúkrahúsinum 78 ára gamal.

Eyvindur var sonur Amaliu, f. Egholm, og Einar Mohr í Havn, næstyngstur av fýra brøðrum: Lill, Heri og Tórálvur.

Eftir lokna skúlagongd lærdi hann til fínmekanikara, og royndist hann framúr góður handverkari, og hevur hann avrikað mangt handaligt listaverk.

Í fyrru giftu var Eyvindur giftur Tove Thomsen av Tvøroyri og fingu tey sonin Kára. Seinni giftist hann Ninu Nolsøe úr Vági, tey fingu døturnar Turið og Gullu.

Í ein mansaldur hevur Eyvindur livað sum listamaður burturav.

## Heðin Mortensen í bláu bók

**Tíðindaskriv**



Bláa bókin hjá Kraks 2005/2006 er í hesum døgum komin út í Danmark, Føroyum og Grønlandi. Í bókini eru lívsævisøgur hjá 7.952 núlivandi donskum, føroyskum og grønlendskum kvinnum og monnum. Nýnevndur føroyingur í bókini er Heðin Mortensen, borgastjóri í Tórshavnar kommunu.

### Andlát & jarðarferðir

**Jarðarferðin hjá Otto Kruse** verður úr Eiðis kirkju leygardagin klokkan 14.

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra kona, móðir, vermóðir og omma okkara

**Vilhelmina Jacobine Svanhilda Joensen**
ættað úr Kollafirði

andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 2. juni, 83 ára gomul.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum sunnudagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Kollafjarða kirkju mánadagin 6. juni kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Hendrik**

Tey, ið ynskja at minnast Vilhelminu, kunnu í staðin lata eina gávu til Eldrasambýlið í Kollafirði á konto í Føroya Sparikassa.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá ið elskaði pápi okkara, verfarðir, abbi og langabbi

**Hasse Kragesteen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum so trúliga vitjaðu hann í tí dagliga.
Tøkk til tykkum á G4, ið tóku tykkum so væl av honum.
Tøkk til Hera Joensen, prest, fyri troystarrík orð.
Takk til tykkum øll, ið hjálptu til við ervinum.
Takk fyri telefonsamrøður, takk fyri kransar og blómur, takk til sangarar fyri vakran sang og tann stóra skara, ið fylgdi honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Anna og Borgarhjørt**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum , sum sýndu samkenslu, tá kæri bróður, pápabeiggi og mammubeiggi okkara

**Sofus Martin Müller**
Porkeri

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til prest, sangarar, berarar og kirkjutænarar og til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk til starvsfólk á Suðuroyar Sjúkrahúsi og heimahjálparar, sum vóru so góðar við hann.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Missiónshúsið og til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Zacharias**

Lesið Sosialin -so eru tit við!